

# Ger eitt kraftlop á tíni starvsleið

## – verð kredittleiðari í Suðuroyar Sparikassa

Suðuroyar Sparikassi – minsti og smidligasti banki í Føroyum – leitar eftir kvinnuligum ella mannligum úrmælingi til starvið sum kredittleiðari bankans.

**Tínir eginleikar**
Tínir fremstu eginleikar eru, at tú dugir at lyfta teg upp um vanliga gerandisdagin og hugsar í nýggjum møguleikum, at tú hevur lætt at taka við ábyrgd, og at tú hevur hug at brúka henda góða møguleika til at menna bankan.

Harumframt ert tú opin, leggur sál í arbeiðið og arbeiðir sjálvstøðugt. Tú trívist væl við avbjóðingum, samstarvar væl við øll og hevur í tær eina sunna javnvág millum kredittmeting og keypmansskap.

**Arbeiðsøki**
Nøkur av arbeiðsøkjum tínum í Suðuroyar Sparikassa eru:

- ábyrgd og uppfylging av kredittveitingum við beinleiðis tilvísing til stjóran
- ábyrgd av skipanum, politikki og mannagongdum á kredittveitingarøkinum
- hugkveikjan hjá deildum og stjórn, tá ið ræður um kredittveitingar

Í næstum koma BASELII-reglurnar í gildi í Føroyum, og broytingar verða í roknskaparlógini. Tú fært ábyrgdina av tilgongdini til hesar broytingar við tilvísing til stjóra bankans.

**Førleikar**
Tú hevur royndir við kredittveitingum úr peningastovni, hollar royndir við vinnulívsfígging og eina akademiska útbúgving sum cand.oecon, cand. merc, MBA, HD ella líknandi.

**Meira at vita**
Vilt tú vita meira um starvið, set teg í samband við stjóra bankans, Søren L. Bruhn, á tlf. 359870.

**Umsóknir**
Hevur tú áhuga fyri hesi spennandi avbjóðing, vinarliga send okkum eina umsókn við viðkomandi skjølum, soleiðis at vit hava hana í hendi í seinasta lagi mikudagin 22. apríl 2008. Send umsóknina við teldubrævi til soren@sparsu.fo ella við vanligum brævi til Suðuroyar Sparikassa, Postboks 2, 910 Vágur, viðmerkt "Umsókn."

SENDISTOVAN

SUÐUROYAR SPARIKASSI

# Føroyaprent søkir starvsfólk

## Tilboðsroknari




Vit søkja eftir einum starvsfólki til at rokna prísir og tilboð fyri vørur og tænastur innan grafiskt arbeiði, prent og liðugtgerð.

**Vit vænta, at tú:**
- dugir væl at rokna og heldur, at tað er spennandi
- kanst taka eitt eyka tak og dugir at raðfesta arbeiði tá nógv er at gera
- ert ágrýtin, tekur ábyrgd og dugir at samstarva

**Vit bjóða:**
- eitt avbjóðandi starv í spennandi umhvørvi
- løn eftir førleika og royndum

Tað kann vera ein fyrimunur um tú hevur kunnleika til arbeiðsgongdir á einum framleiðsluvirki ella útbúgving frá grafiskum háskúla, men tað er ikki nøkur treyt.

**Umsókn við CV skal verða okkum í hendi seinast 28. apríl.** Vilt tú vita meira, so set teg í samband við Jonny á tel. 59 45 58, jonny@foroyaprent.fo ella Jon á tel. 59 45 55, hestoy@foroyaprent.fo

## Kundamóttøka (¾ tíð)



Vit søkja eftir einum starvsfólki ¾ tíð til kundamóttøkuna. Arbeiði í móttøkuni umfatar avgreiðslu av kundum, umstilling av telefon og aðrar fyrifallandi uppgávur. Arbeiðstíðin er frá kl. 9 til 15.

**Vit vænta, at tú:**
- hevur arbeiðsroyndir innan kundaavgreiðslu og telefonumstilling
- ert fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni

**Vit bjóða:**
- eitt regluligt starv á einum vælskipaðum arbeiðsplássi
- løn eftir førleika og royndum

**Umsókn við CV skal verða okkum í hendi seinast 28. apríl.** Vilt tú vita meira, so set teg í samband við Jonny tel. 59 45 58, jonny@foroyaprent.fo

## Hjálparfólk



Til prentsmiðjuna søkja vit eftir einum røskum hjálparfólki at arbeiða við liðugtgerð av prentlutum. Arbeiði umfatar at ansa ymiskum maskinum í liðugtgerðini. Upplæring verður givin á staðnum.

**Vit vænta, at tú:**
- hevur áræði og trívist við at passa maskinur
- dugir at arbeiða undir trýsti
- kanst taka eitt eyka tørn tá nógv er at gera

**Vit bjóða:**
- fast og trygt fulltíðarstarv í spennandi umhvørvi
- løn eftir førleika og royndum

**Umsókn við CV skal verða okkum í hendi seinast 28. apríl.** Vilt tú vita meira, so set teg í samband við Jonny á tel. 59 45 58, jonny@foroyaprent.fo ella Kára á tel. 59 45 60, kari@foroyaprent.fo

Føroyaprent er ein fyritøka í vøkstri, sum bjóðar allar vørur og tænastur innan grafiska uppseting av prentlutum, prenting og bókbinding. Føroyaprent er ein nýmótans fyritøka á øllum økjum. Føroyaprent hevur greiðan málsetning um at vera best á sínum øki, og setur ein heiður í at náa hesi mál. Tað veri seg innan tøkni, tænastuveitingar og starvsfólkaøkið.

Føroyaprent

Hoyviksvegur 59 - Postsmoga 3118 - 110 Tórshavn
Info@foroyaprent.fo - www.foroyaprent.fo - Tel. 31 45 55

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI 541 705